# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Poula Larsen**, fødd Leo, ættað úr Toftalíð í Vági, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist sunnudagin á Hvidovre Sjúkrahúsi, 99 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Ása Olafsdóttir Weihe**, fødd Reinert, fer til gravar úr Vesturkikrjuni hósdagin 4. september klokkan 13.

**Mia Olsen**, vanliga nevnd Mia hjá Jóhan (Djóan), ættað av Tværoyri, andaðist í Keypmannahavn sunnumorgunin 91 ára gomul.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaða

**Turið Sólbjørg Olsen**
Søldafjørður

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Henning Bøgesvang prest fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til Jens Marna, Kim og Vox fyri avbera vakran sang, og annars til øll, sum vóru við til at gera jarðarferðina so vakra.
Tøkk til allar stuðlarnar, sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og gávur til Barnadeildina og Reiðrið.
Tøkk fyri ta ótrúligu hjálp vit fingu til jarðarferðina og ervi.

**Mamma og Jonhard, babba og Oddny, Tóra og Rebekka**

**Dagurin**
**3. september. Seraphia.** Kristin trælkvinna úr Sýriulandi, sum varð hálshøgd fyri trúar sakir.

# Ann Hjaltalin 40 ára starvsdag í landsstýrinum

Í gjár hevði Ann Hjaltalin, skrivari hjá løgmanni, 40 ára starvsdag.

Dagurin varð hátíðarhildin við morgunmati á Løgmansskrivstovuni, har Jóannes Eidesgaard, løgmaður handaði Ann heiðursmerki frá drotningini.

Tað sjáldsama við hesum er, at tey bæði – Ann og Jóannes – hava gingið í skúla saman á Tvøroyri.

Ann byrjaði í skrivstovulæru á Landsskrivstovuni í 1968, sum tá var fyrisiting fyri alt landsstýrið, stóran part av almennu fyrisitingini og partvís eisini skrivstova fyri løgtingið. Eftir lokið læruprógv í 1971 varð hon sett í starv sum skrivstovukvinna.

Síðan desember 1997 hevur Ann verið skrivari hjá skiftandi løgmonnum.

Ann hevur starvast saman við 9 av teimum 11 løgmonnunum, síðan Heimastýrislógin kom í 1948.

**sb.**



*Ann Hjaltalin kom til arbeiðis í gjáramorgunin, og visti av ongum, nú starvsfelagar hennara høvdu gjørt burturúr hesum runda starvsdegi hennara*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Jóannes Eidesgaard handar Ann Hjaltalin blómutyssi og heiðursmerkið frá drotningini*

# MC-Boogie í Suðuroy



Í vikuskiftinum 6. og 7. september skipar Føroya Ellisakfør fyri MC-boogie, sum hesaferð verður í Suðuroy. Tiltakið er fyri øll sum hava motorsúkklu og eru motorsúkkluáhugað.

MC-Buggie hesaferð verður í Suðuroy, og tað er Føroya Ellisakfør sum skipar fyri tiltakinum.

Formaðurin í Føroya Ellisakførum, Eirikur Ólason Simonsen, sigur, at endamálið við MC-Boogie tiltakinum er at savna motorsúkklukoyrarar og motorsúkkluáhugað til eitt felags tiltak.

Skipað verður fyri ymiskum á túrinum, t.d. ber til at tekna seg til at sleppa inn í kolanámini í Hvalba við ferðaleiðara. Hetta verður seinnapartin leygardagin og sunnudagin.

Gist verður á Hotell Øravík, har ymiskt undirhald verður. Hotellið bjóðar Beaf Stroganoff fyri serprís leygarkvøldið.

Tilmelding ferð fram á Hotell Øravík til tey, ið ynskja gisting har. Tað er neyðugt at tekna seg á Hotell Øravík til døgverðan. Hetta skal gerast áðrenn kl. 18 mikudagin 3. september. Hotellið hevur telefon 371302.

Eirikur vónar at so nógv koma við sum gjørligt, og bjóðar hann øllum motorsúkklukoyrarum og áhugaðum vælkomnum. Tey sum ikki hætta sær á motorsúkklu eru vælkomin at koma við bili.

Tey, sum koma á motorsúkklu, mugu minnist til at hava stroppar við til at surra súkkluna umborð á Smyrli, sigur Eirikur Ó. Simonsen, formaður í Føoya Ellisakførum.